# Einsæris frítíðarferðatrygd

**Tryggingartreytir Nr. 11-10**

TRYGD

# Innihaldsyvirlit

**Tryggingartreytir fyri einsæris frítíðarferðatrygging, ið eru galdandi saman við lógini um Tryggingaravtalur**


1. Alment 4
1.1 Tryggjaði 4
1.2 Tey tryggjaðu 4
1.3 Landafrøðilig øki 4
1.4 Fulnaðartíðarskeið 4
1.5 Ferðir, sum tryggingin ikki svarar fyri 4
1.6 Tryggingarfulnaður 4
2. Sjúka og skaði 4
2.1 Útreiðslur, sum tryggingin veitir fulnað fyri 4
2.2 Útreiðslur, sum tryggingin ikki svarar fyri 5
2.3 Bindandi boð 6
2.4 Serstakar treytir fyri tannvigerð 6
2.5 Treytir, tá ið skaði er 6
3. Heimflutningur 6
3.1 Tryggingin rindar útreiðslur til 6
3.2 Tryggingin rindar ikki fyri 6
3.3 Treytir, tá skaði er 6
4. Sjúkrafylgi/Tilkalling 6
4.1.Tryggingin rindar fyri 6
4.2 Treytir fyri fulnaði 7
4.3 Tryggingin rindar ikki 7
4.4 Treytir, tá skaði er 7
5. Heimkalling 7
5.1 Treytir, tá skaði er 7
5.2 Treytir fyri fulnaði 8
5.3 Treytir í samband við skaða 8
6. Álop 8
6.1 Tryggingin fevnir um 8
6.2 Tryggingin fevnir ikki um 8
6.3 Treytir, tá skaði hendir 8
7. Vanlukka 8
7.1 Tryggingin svarar fyri 8
7.2 Tryggingin rindar 8
7.3 Tryggingin svarar ikki fyri 9
7.4 Rindan av endurgjaldi 9
7.5 Ásetan av endurgjaldið við avlamni 9
7.6 Gerðarrættur 10
7.7. Treytir, tá ið skaði er 10
8. Privat ábyrgd 10
8.1 Hvørjar útreiðslur svarar tryggingin fyri 10
8.2 Tryggingin svarar ikki fyri endurgjaldsábyrgd tryggjaða 10
8.3 Tryggingin svarar haraftrat ikki fyri 10
8.4 Treytir, tá skaði er 10
9. Rættarhjálp 10
9.1 Tryggingin svarar fyri 11
9.2 Sjálvsábyrgd 11
9.3 Tryggingin svarar ikki fyri 11
9.4 Treytir, tá ið skaði er 11
10. Endurgjaldsferð 12
10.1 Nær veitur tryggingin fulnað 12
10.2 Uppgerð av endurgjaldinum: 12

10.3 Endurgjald verður ikki veitt fyri 12
11. Seinka uppmøting 12
11.1 Tryggingin svarar fyri 13
11.2 Treytir, tá ið skaði hendir 13
12. Viðføri og viðførisseinking 13
12.1 Tryggingin svarar fyri 13
12.2 Tryggingin svarar ikki fyri hesar lutir 13
12.3 Skaðatilburðir, fevndir av tryggingini: 13
12.4 Tryggingin rindar ikki skaðatilburðir orsakað av 13
12.5 Uppgerð av endurgjaldinum 14
12.6 Treytir, tá ið skaði hendir 14
12.7 Fulnaður fyri viðførisseinking 14
13. Flutningsseinking 14
13.1 Tryggingin svarar fyri 14
14. Frítíðaríbúðartrygging 15
14.1 Tryggingin svarar fyri 15
14.2 Treytir, tá ið skaði hendir 15
15. Krígsvandi/burtur-flyting 15
15.1 Fulnaður 15
15.2 Treytir, tá ið skaði hendir 15
16. Kreppuhjálp 15
16.1 Hvat svarar tryggingin fyri 15
16.2 Treytir, tá ið skaði hendir 16
17. Sálarfrøðihjálp 16
17.1 Hvat svarar tryggingin fyri 16
17.2 Treytir, tá ið skaði hendir 16
18. Virkni-ítrottur, Ískoytisfulnaður 16
18.1 Hvat fevnir tryggingin um 16
18.2 Útreiðslur fevndar av tryggingini: 16
18.3 Treytir, tá skaði hendir 17
19. Felagstreytir 17
19.1 Tænsta áðrenn fráferð 17
19.2 Heilivágur-tænasta 17
19.3 Boðtænastan 17
19.4 Sjúka og heimflutninguri – tænasta 17
19.5 Skaðatænasta 17
19.6 Virkin skaðahjálp 17
19.7 Hjálp, tá skaði er 17
19.8 Skaðaviðgerð og skaðafráboðan 17
19.9 Vanlig undantøk 18
19.10 Fulnaðir frá øðrum 18
19.11 Tryggingarupphædd 18
19.12 Aftursókn 18
19.13 Avhending av endurgjaldskravi 18
20. Endurgjaldsyvirlit 19

# 1. Alment

## 1.1 Tryggjaði

Tryggingin kann verða teknað av fólki, sum hevur bústað í Føroyum, og sum skal á frítíðarferð við fráferð úr Føroyum ella Danmark.

## 1.2 Tey tryggjaðu

Tryggingin fevnir um tey, sum ferðast saman á somu frítíðarferð, og sum eru nevnd á sama tryggingaruppkravi

## 1.3 Landafrøðilig øki

Tryggingin fevnur um tryggjaða á frítíðarferð ella lestrarferð fyri egna rokning uttanfyri Føroyar. Tryggingin fevnir sostatt ikki um ferð í Føroyum.

## 1.4 Fulnaðartíðarskeið

Tryggingin veitir fulnað frá tí løtu, tryggjaði fer frá bústaði sínum í Føroyum til tess at byrja ferðina, ella tá tryggingin tekur við, um hetta skuldi verið seinni.
Fulnaðurin fyri hvørja einstaka ferð heldur uppat, tá tryggjaði kemur aftur til Føroyar, ella tá tryggingin gongur út, um tað er fammanundan heimkomu. Í tryggingartíðarskeiðinum kann tryggjaði fara fleiri ferðir í tí landafrøðiliga øki, sum svarar til goldna trygginargjaldið. Tryggingin veitir fulnað í upp til 31 fylgjandi dagar.
Tryggingin veitir fulnað í tí tíðarskeiði, sum tryggjaði hevur upplýst, og sum stendur á tryggingaruppkravinum. Verður heimkoman seinkað, og er orsøkin ikki egin skuld, verður tryggingar-tíðarskeiðið longt við upp til 48 tímum uttan eyka tryggingargjald (sí eisini stk. 2.1.15).

## 1.5 Ferðir, sum tryggingin ikki svarar fyri

Ferðir, sum á ein hvønn hátt eru vinnuligar, uttan mun til í hvørjum vavi.
Ferðir, hvørt endamál ikki er frítíð, t.d. neyðarhjálpararbeiði.
Ferðir, sum á ein hvønn hátt fevna um vísundaligar kanningar ella rannsóknir.
Ferðir ella uppihald í økjum, har vandin er øktur orsakað krígsstøðu, borgarakríggj, umfarasóttir ella aðrar umstøður, sum, tá tað snýr seg um vanda, kunnu javnmetast. Sí tó stk. 15.
Hesir vandar kunnu tó verða fevndir eftir avtalu við felagið.

## 1.6 Tryggingarfulnaður

Frítíðarferðatrygging veitir fulnað aftrat tí, sum fæst frá sjúkrakassanum, eftir galdandi reglum fyri veitingar eftir donsku sjúkratryggingarlógini fyri fólk búsitandi í Føroyum umframt sambært galdandi millumtjóðarsáttmálanum og reglum fyri sjúkraviðgerð ella heimflutning.
Frítíðarferðatryggingin veitur einans fulnað fyri tað, sum ikki verður veitt sambært frammanfyristandandi.

# 2. Sjúka og skaði

Tryggingin veitir fulnað uttanfyri Føroyar í tí landafrøðiliga økinum, sum ásett er í tryggingarskjalinum, útreiðslur av sjúku ella skaða og heimflutning.
Endurgjaldsupphæddir, sum eru hægstu mørk felagsins í skaðaføri:

| Sjúka og skaði | |
|---|---|
| | Upphædd |
| Viðgerðarútreiðslur í DKK | Óavmarkað |

Gerst tryggjaði brádliga sjúkur ella kemur til skaða á eini frítíðarferð uttanfyri Føroyar, veitir tryggingin fulnað fyri gjaldi av útreiðslum til viðgerð og/ella sjúkrahúslegu hjá tryggjaða við teimum nevndu endurgjaldsupphæddunum.

## 2.1 Útreiðslur, sum tryggingin veitir fulnað fyri

Tryggingin veitir fulnað fyri vanligum og neyðugum útreislum til:

2.1.1 Viðgerð hjá skrásettum lækna, tað verið seg undir sjúkrahúslegu ella ambulant

2.1.2 Sjúkrahúslegu við kamari og mati eftir vanligum takstum fyri semi-privat (2-seingjastova) ella fyri intensivu deild á viðkomandi sjúkrahúsi.

2.1.3 Heilivág eftir læknaboðum

2.1.4 Viðgerð hjá fysioterapeuti ella kiropraktori við upp til DKK 15.000.

2.1.5 Tannlæknaviðgerð við upp til DKK 10.000

2.1.6 Bráðfeingis samband við Gouda Rejseforsikring (hereftur stytt Gouda)

2.1.7 Flutning til viðgerðarstaðið.

2.1.8 Telefonuppringin, lesitilfar í samband við innlegging á sjúkrahús, sum varir meir enn 24 tímar við upp til DKK 500 fyri hvøjra byrjaða viku, tó í mesta lagi DKK 3.000 tilsamans.
Skjalprógvan fyri hesum útreiðslum kann verða kravd.

**2.1.9** Útreiðslur til leigu av sjónvarpi og útvarpi upp til DKK 1.000 um vikuna, tó í mesta lagi DKK 3.000 tilsamans.

**2.1.10** Uppihald á hotelli eftir læknaboðum umframt matur við upp til DKK 1.500 fyri samdøgrið eftir góðkenning frá Gouda, um so er, at viðgerð, sum annars hevði kravt sjúkrahúsinnlegging, á tann hátt kann gerast ambulant.

**2.1.11** Uppihald á hotelli umframt mat við upp til DKK 1.500 um samdøgrið eftir góðkenning frá Gouda eftir at viðgerðin er liðug, til heimferð ella heimflutningur kann fara fram.

**2.1.12** Uppihald á hotelli og matur við upp til DKK 1.500 um samdøgrið eftir góðkenning av Gouda, til møguliga ætlað ferðaleið kann verða upp afturtikin, sí eisini 3.1.4

Tryggingin veitir haraftrat fulnað fyri vanligum, rímuligum og neyðum útreiðslum til:

**2.1.13** Føðing fram til 4 vikur undan væntaðari føðing umframt viðgerð (sum omanfyri) av tí/teimum ov tíðliga føddum barni/børnum, innleggin á sjúkrahúsi og uppihald á hotelli við mati (sum omanfyri).

**2.1.14** Viðgerð av bráðkomnari sjúku hjá óføddum barni/børnum íkomin á ferðini og til 4 vikur undan væntaðari føðing.

Fulnaðr eftir 2.1.13. og 2.1.14. verður veittur undir tryggingini hjá móðirini.

**2.1.15** Leinging av tí tíðarskeiði, tryggingin veitir fulnað í, um so er at heimkoman hjá tryggjaða verður seinkað út um tryggingartíðarskeiðið av skaða á ferðini, sum er fevnd av tryggingini.

## 2.2 Útreiðslur, sum tryggingin ikki svarar fyri

**2.2.1** Viðgerð, sum tørvur og kunnleiki var um, áðrenn ferðin byrjaði

**2.2.2** Veitingar í sambandi við sjúku ella skaða, sum er fevnd av avtalum ella altjóða sáttmálum.

**2.2.3** Eftirlit og viðgerð, herundir heilivágur, sum krevst til tess at halda niðri og stilla varandi og áhaldandi sjúku og líðing í tí sambandi.

**2.2.4** Viðgerð av AIDS-staðfestum sjúklingum uttan mun til viðgerðarorsøk.

**2.2.5** Heilivág, sum ikki er fyriskipaður av lækna.

**2.2.6** Viðgerð av sjúku, sum stendst av at vera við barn, og sum kemur á innanfyri 4 vikur fyri væntaða føðing.

**2.2.7** Fosturtøka (abortus provocatus)

**2.2.8** Endurgjald, útskifting ella umvæling av hjálparlimum (protesum), brilum, kontaktlinsum ella hoyritólum

**2.2.9** Uppihald á heilsubótar- ella hvíldarheimi

**2.2.10** Viðgerð ella sjúkrahúsuppihald av einum hvørjum slag, uttan mun til orsøk, eftir at komið er aftur til Føroya. Sí tó stk. 17.

**2.2.11** Framhaldandi viðgerð og uppihald, tá tryggjaði sýtir fyri at verða fluttur ella sendur heim, eftir at læknin hjá Gouda og viðgerðandi læknin á staðnum hava mett, at flyting ella heimflutningur er ráðilig.

**2.2.12** Viðgerð og uppihald uttanlands, tá læknin hjá Gouda hevur gjørt av og viðgerðandi lækni á staðnum hevur góðkent, at viðgerðin kann bíða til komið verður til Føroya

**2.2.13** Flutningur orsakað av, at tryggjaði óttast smittuvanda.

**2.2.14** Plastiska skurðfrøði ella fríðkandi skurðviðgerð ella viðgerð av fylgjusjúkum, (eftirsjúkum) ella tilslagi í hesum sambandi, uttan so at skurðviðgerðin er beinleiðis avleiðing av einum skaða, sum hevur kravt viðgerð á sjúkrahúsi innan 24 tímar eftir, at skaðin er hendur.

**2.2.15** Útreiðslur sum standast av, at tryggjaði ikki fylgir boðum frá viðgerðandi lækna á staðnum og/ella Gouda lækna

**2.2.16** Viðgerð av verandi ella varandi sjúku og líðingar í tí sambandi, t.v.s. líðingar, sum hava havt við sær sjúkuteking ella eru staðfestar, áðrenn farið varð úr Føroyum, uttan so at sjúkan ikki innanfyri teir seinastu tveir mánaðirnar undan fráferð úr Føroyum hevur havt við sær innlegging á sjúkrahúsi ella broyting í ásettum heilivági.

**2.2.17** Um so er, at tryggjaði ikki er farin til lækna ella hevur sítt fyri viðgerð av eini sjúku, hóast tryggjaði átti at vita ella havt illgruna um, at sjúkan kravdi viðgerð ella var munandi versnað, áðrenn farið varð úr Føroyum. Sama er galdandi, um so er, at tryggjaði er givin upp, ella sýtt er fyri at viðgera hann í Føroyum.

### 2.3 Bindandi boð

Um tygum, eftir at hava lisið omanfyri standandi stk. 2.2.16 og 2.2.17, eru í iva, um útreiðslur til viðgerð av einari sjúku verða goldnar, kunnu tygum venda tygum til Gouda og fáa nærri boð. Útvegan av skjalprógvi frá lækna at nýta í hesi meting er fyri rokning hjá tryggjaða.

### 2.4 Serstakar treytir fyri tannvigerð

Felagið hevur rætt til at minka ella lata endurgjaldið til útreiðslur av tannviðgerð detta burtur, um so er at tennirnar á tryggjaða eftir meting av tannlækna mugu haldast hava verið munandi verri enn hjá fólki um sama aldur, sum regluliga ganga til eftirlit og fáa ta viðgerð, sum mælt verður til í tí sambandi.

### 2.5 Treytir, tá ið skaði er

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

## 3. Heimflutningur

Er talan um sjúku, skaða ella deyð, rindar tryggingin fyri heimflutning:

| **Heimflutningur** |
|---|
| **Upphædd** |
| **Sambært rokning samb. 2. parti** |

### 3.1 Tryggingin rindar útreiðslur til

**3.1.1** Heimflutning við vanligum flutningsfari ella sjúkrabili, um so er, at viðgerðandi lækni og Gouda meta, at tílíkur heimflutningur er neyðugur og ráðiligur

**3.1.2** Heimflutningur við sjúkraflutningsflogfari, um so er at hetta er góðkent av Gouda, og treytað av at heimflutningurin er skipaður av Gouda.

**3.1.3** Heimflutningur eftir lokna viðgerð við vanligum flutningsfari.

**3.1.4** At koma aftur á ætlaða ferðaleið eftir lokna viðgerð til tað staðið, tryggjaði sambært ætlaðu ferðaætlanini átti at verið staddur.

**3.1.5** Heimflutninguri við deyð, íroknað útreiðslur til lógarásettar fyriskipanir, t.d. balsamering og zinkkistu ella útreiðslur til líkbrenning og/ella jarðarferð á staðnum sambært ynski frá teimum avvarðandi, tó í mesta lagi við eini upphædd svarandi til tað, sum heimflutningurin av tí deyða hevði kostað.
Felagið kann tó krevja, at tann deyði verður fluttr heim við líkskurið fyri eyga.

**3.1.6** Neyðugar og rímuligar útreiðslur til heimflutning av børnum í ferðalagnum undir 18 ár, sum eru fevnd av eini ferðatryggin í felagnum, um so er at foreldur ella ferðafelagi verða flutt heim vegna sjúku, skaða ella deyð.

### 3.2 Tryggingin rindar ikki fyri

**3.2.1** Flutning orsakað av at tryggjaði óttast smittuvanda.

**3.2.2** Útreiðslur til nýggja fráferð ella til at fáa aftur ætlaðu ferðaleiðina, eftir at tann ferðandi er komin aftur til Føroyar, sí tó 10. part.

**3.2.3** Skipar tann tryggjaði sjálvur fyri heimflutninginum ella heimferðini uttan frammanundan hava fingið góðkenning frá Gouda, verða útreiðslurnar einans endurgoldnar um so er, at læknin hjá Gouda út frá eini læknaligari meting heldur flutningin verða ráðiligan og neyðugan.
Í slíkum førum verður veittur fulnaður fyri í mesta lagi eini upphædd, sum svarar til tær útreiðslur, felagið vildi havt, um so var at Gouda hevði skipað fyri heimflutninginum /heimferðini.

### 3.3 Treytir, tá skaði er

Tá skaði er hendur, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

## 4. Sjúkrafylgi/Tilkalling

Fulnaður og upphæddir, sum eru hægsta mark felagsins í sambandi við skaða, uttan mun til tal á luttakarum:

| **Sjúkrafylgi - Tilkalling** |
|---|
| **Upphæddir** |
| **3 fólk eftir egnum ynski** |
| **Upp til DKK 1.500 pr. dag**<br>**í mesta lagi DKK 50.000** |

### 4.1.Tryggingin rindar fyri

Tryggingin veitir fulnað fyri ferðaútreiðslum og útreiðslum til uppihald til avvarðandi ella ferðafelaga, sum eftir avgerð tryggjaða antin verður hjá ella kallaður til fyri at vera hjá

tryggjaða og/ella fylgist við tryggjaða undir heimflutningi til Føroyar, um so er at tryggjaði ikki kann fullføra ferðina orsakað av bráðari sjúku, álvarsligum skaða, føðing áðrenn 4 vikur fyri væntaða føðing smb. stk. 2.1.13 og 2.1.14, ella deyða fevndur av tryggingini. Fulnaðurin fevnir um eykaútreiðslur til fylgdarfólk:

**4.1.1** Til hotelluppihald, mat og flutning á staðnum.

**4.1.2** Til heimferðina við vanligum rutuflogfari, tó í mesta lagi Business Class.
Fylgir tann avvarðandi tí sjúka undir heimflutningi, rindar tryggingin fyri sama klassa, sum tann sjúki ferðast á.

**4.1.3** Til afturferðina hjá sjúkra-fylgdarfólkinum til staðið, har fylgjan byrjaði (frítíðar-staðið) seinast tvær vikur eftir møguligan heimflutning.
Tryggingin veitir ikki fulnað fyri nýggjum uppihaldi fyri fylgdarfólki á frítíðarstaðnum.

**4.1.4** Fráferð úr Føroyum út til tryggjaða við vanligum rutuflogfari, í mesta lagi Business Class.

**4.1.5** Til Frítíðar Ferðatrygging við ískoytisfulnaðir til fylgdarfólk

### 4.2 Treytir fyri fulnaði

Tað er ein treyt fyri fulnaði í samband við sjúku ella skaða:

4.2.1 At støðan hjá tí tryggjaða krevur sjúkrahúsinnlegging í í minsta lagi 5 dagar, ella at støðan hjá tí tryggjaða er lívshættislig.

4.2.2 At viðgerðandi lækni á staðnum og læknin hjá Gouda meta støðuna hjá tryggjaða og hvussu leingi innlegging á sjúkrahús er neyðug.

4.2.3 Fulnaðurin er einans galdandi fyri tilkalling úr og/ella fylgju til Føroyar.

### 4.3 Tryggingin rindar ikki

Útreiðslur til tilkalling, um so er at ætlan er um at senda tryggjaða heim innanfyri trý samdøgur eftir, at tilkallaði fór avstað.

### 4.4 Treytir, tá skaði er

Tá skaði hendir, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. Parti.

## 5. Heimkalling

Fulnaður og upphæddir, sum eru hægsta mark felagsins í sambandi við skaða, uttan mun til tal av luttakarunum á tryggingarskjalinum:

| **Heimkalling** | |
|---|---|
| | **Upphædd** |
| **Eyka útreiðslur til flutning** | **DKK 50.000** |

### 5.1 Treytir, tá skaði er

Verður tryggjaði kallaður til Føroyar og tí noyðist at steðga frítíðarferðini fyrr enn ætlað, fevnir tryggingin um skjalprógvaðar eykaútreiðslur, sum tryggjaði og møguliga eitt fylgdarfólk fær, sum er skrásett á sama ferðaskjali sum tryggjaði ella sum hevur keypt ferðina fyri at ferðast saman við tryggjaða, og sum hevur trygging í Trygd, um so er at heimkalling stendst av hesum áðum:

**5.1.1** At nærskild, t.v.s. hjúnarfelagi hjá tryggjaða, samlivandi, børn, svigarbørn, ommu/abbabørn, foreldur, omma og abbi, verforeldur, systkin, svágur ella sonarkona í Føroyum verða fyri andláti, bráðari ákomnari lívshættisligari sjúku ella álvarsligum vanlukkutilburði, sum krevur sjúkrahúslegu.

**5.1.2** Eldsbruni ella innbrot á bústaðnum hjá tí tryggjaða ella á egnum virki, um so er, at løgreglan hevur fingið fráboðan.

**5.1.3** Fíggjarsvik á virkinum hjá tryggjaða, sum er framt av fólki, sum starvast í virkinum, tá brotsverkið verður avdúkað eftir at tryggjaði fór avstað, og treytað av, at fráboðan er send løgregluni.

**5.1.4** Arbeiðssteðgur, sum ikki er samsvarandi sáttmála og sum kemur fyri í virkinum hjá tryggjaða.

**5.1.5** Um so er, at ferðin verður uppaftur tikin, verða goldnar rímuliga eyka ferðaútreiðslur til afturferðina. Tað er tó ein treyt, at í minsta lagi 15 dagar eru eftir av ferðatíðarskeiðinum. Ferðatíðarskeiðið er tað dagatal, sum tryggjaði kann skjalprógva, at ætlaða ferðin skuldi varða.

**5.1.6** Er endurgjald veitt fyri afturferð, verður endurgjaldsferð ikki veitt, samb. stk. 10.

**5.1.7** Verður ferðast í bili, kann annað flutningsfar enn bilur verða nýtt til heimflutningin, um hetta er avtalað við Gouda. Í slíkum føri rindar tryggingin eisini útreiðslur til heimflutning av

bilinum, tó treytað av, at ongin av hinum, sum luttaka í ferðini, eru før fyri at koyra bilin heim.

### 5.2 Treytir fyri fulnaði

Tað er ein treyt fyri endurgjaldsábyrgd felagsins, at tryggingartilburðurin er íkomin eftir at tryggjaði fór heimanífrá, og at heimkallingin fer at hava við sær, at heimkoman verður fyrr enn 12 tímar frá annars ætlaðu heimkomuni.
Tryggjaði skal aftaná fyri egna rokning útvega læknaváttan frá viðgerandi lækna sum skjalprógv fyri heimkallingini sambært stk. 5.1.
Fyri at fáa fulnaðsambært stk. 5.1.2 til 5.1.4 er tað ein treyt, at talan er um munandi broytnigar í viðurskiftinum hjá tryggjaða, antin arbeiðsliga ella privat, sum skjalprógva krevst, at tryggjaði sjálvur beinanvegin er tilstaðar í Føroyum av fíggjarligum áðum.

### 5.3 Treytir í samband við skaða

Tá skaði hendir, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

## 6. Álop

### 6.1 Tryggingin fevnir um

Verður tryggjaði álopin av fólki, og hevur hetta við sær persónsskaða, sum kann ávísast, veitir tryggingin fulnað eftir teimum reglum, sum ein skaðavoldari vildi verið dømdur at gjalda í samsvari við føroyska rættarsiðvenju fyri álop, sum var fari fram undir líknandi umstøðum í Danmark ella í Føroyum. Endurgjaldið, íroknað endurgjaldið sambært stk. 7 Vanlukka, kann tó ikki fara uppum niðanfyri nevdu upphæddir, sum er hægsta mark í skaðaføri:

| Álop | |
|---|---|
| | Upphædd |
| Endurgjaldsupphædd | DKK 500.000 |

Tað er ein treyt fyri endurgjaldsábyrgd felagsins, at tryggjaði beint eftir álopið meldar tilburðin til løgregluna og setir seg í samband við ein lækna/sjúkrahús á staðnum.

### 6.2 Tryggingin fevnir ikki um

**6.2.1** Um so er, at skaðin er elvdur av tryggjaða, tá hann av egnum ávum var ávirkaður av rúsevni, og rúsurin er ein viðvirkandi orsøk til skaðan.

**6.2.2** Skaði á lutir orsakað av álop

**6.2.3** Álop á tryggjaða, sum verður framt av einum av teimum sum ferðast saman við viðkomandi (persónar, sum eru skrásettir á sama ferðaseðli ella luttakaraprógv sum tryggjaði, ella hava keypt ferðina fyri at ferðast saman við tryggjaða)

**6.2.4** AIDS-staðfestar persónar.

### 6.3 Treytir, tá skaði hendir

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

## 7. Vanlukka

### 7.1 Tryggingin svarar fyri

Endurgjald eftir hesum fulnaði kann ikki fara uppum hesar upphæddir, sum eru størstu upphæddir felagsins í samband við skaðatilburð:

| Vanlukka | |
|---|---|
| | Upphæddir |
| Avlamni | DKK 1.000.000 |
| Deyði | DKK 500.000 |

Fyri persónar omanfyri 70 ár rindar tryggingin tó bert helvtina av tryggingarupphæddini. Fyri persónar undir 18 ár rindar tryggingin við deyð í mesta lagi kr. 10.000
Verður tryggaði á ferðini fyri vanlukkutilburði, gevur tryggingin rætt til endurgjald fyri varandi mein ella deyð.
Við vanlukkutilburð er at skilja ein tilvildarlig, brádlig ávirkan uttanífrá á kroppin, sum tann tryggjaði ikki kann gera við, og at tað hevur sjónskan løst við sær.

### 7.2 Tryggingin rindar

Verður tryggjaði fyri einum vanlukkutilburði á ferðini, rindar tryggingin:

**7.2.1** Avlamnisendurgjald
Um so er, at vanlukkutilburðurin hevur havt við sær varandi avlamni upp á í minsta lagi 5%, hevur tryggjaði rætt til avlamnisendurgjald. Avlamninsendurgjaldið svarar til avlamnisstigið í % av hægstu tryggingarupphæddini. Tað er tó ein treyt, at tryggjaði er á lívi, tá endurgjaldið verður útgoldið.

**7.2.2** Endurgjald við deyð
Er tann tryggjaði deyður beinleiðis av vanlukkuni, verður deyðsendurgjald goldið. Er avlamnisendurgjald longu útgoldið eftir

vanlukkutilburðin, verður bert goldin tann upphædd, sum deyðsendurgjaldið er hægri enn endurgjaldið, sum er goldin frammanundan.

**7.2.3** Endurgjald fyri ferðafelagar. Um so er at fleiri í ferðalagnum, sum eru tryggjaði undir hesi trygging, verða avlamin ella doyggja eftir sama vanlukkutilburð, kann felagsins endurgjaldsábyrgd ongantíð fara uppum DKK 4.000.000 við avlamni og/ella DKK 2.000.000 við deyð, uttan mun til um fleiri tryggingar eru teknaðar hjá felagnum.

**7.2.4** Endurgjald í sambandi við tropusjúkur. Er tropusjúka íkomin á ferðini, rindar tryggingin fyri avlamni sum beinleiðis fylgja av sjúkuni. Avlamni verður ásett eftir somu reglum, sum fyri vanlukkutilburð, smb. stk 7.2.1 og 7.5.1

Tað er ein treyt fyri endurgjaldsábyrgd felagsins, at tryggjaði hevur hildið seg til tilmælið hjá WHO og /ella tí danska Statens Seruminstitutt, hvat viðvíkur koppseting og profylakse, herundir medicinsk malaria profylakse, tá ferðast verður í viðkomandi øki.

**7.2.5** Endurgjald fyri tannskaðar. Tannskaðar, sum eru íkomnir av vanlukkutilburði á ferðini, svarar tryggingin fyri við upp til DKK 10.000. Tað er ein treyt, at tannviðgerðin verður framd á ferðini. Tannviðgerð, sum er fram, eftir at komið er aftur til Føroya, verður ikki goldin.

**7.2.6** Fyri vanlukkutilburður sum er íkomnir á ferð loftvegis eru hesar serligu avmarkingar galdandi:
-Tryggingin fevnir bert um vanlukkutilburðir, sum tann tryggjaði er fyri sum ferðafólk við loftfari, sum er tjóðskaparsett loftfari.
- Tryggingin fevnir ikki um tryggjaða sum flogskipari ella 2. flogskipara á flogi.

## 7.3 Tryggingin svarar ikki fyri

**7.3.1** Avlamni, sum var íkomið áðrenn vanlukkutilburðin, gevur ikki rætt til endurgjald. Avlamni, sum var íkomið frammanundan, kann tí ikki hava við sær, at avlamnisstigið verður ásett hægri, enn um tílikt avlamni ikki hevði verið íkomið.

**7.3.2** Sjúku og útbrot av fjaldum sjúkuílegum, hóast sjúkan er uppkomin ella versnað av einum vanlukkutilburði. Heldur ikki rindar tryggingin fyri versnaðar fylgjur, herundir deyð, eftir vanlukkutilburð, sum komast av verandi sjúku ella sjúku sum kemur uppí.

**7.3.3** Vanlukkutilburð, herundir deyð, sum stendist av sjúku ella er fylgja av læknaligari viðgerð.

**7.3.4** Skaði, sum er íkomin av smittu av bakterium ella virus.

**7.3.5** Vanlukkutilburður, íkomin í arbeiði.

**7.3.6** Tannskaðar, sum eru íkomnir ella versnaðir, tá tennirnar hjá tryggjaða sambært meting av tannlækna, mugu metast hava verið í munandi verri standi enn hjá fólki um sama aldur, sum ganga til regluligt tannlæknaeftirlit og fáa tað viðgerð, sum mælt er til í tí sambandi.

**7.3.7** Tannskaðar, sum berast á, tá tugt verður, uttan mun til, hvør orsøkin er til tyggiskaðan.

**7.3.8** Vanlukkutilburð, sum hendur, tá tryggjaði tekur lut í alpinskari skíðrenning, amerikonskum fótbólti, ballónferð ella klintring í fjøllum og bjørgum, koyring við bobbsletu, boksing, bungyjump, glíming, kaving, fallskjólaútlop, fikting, hanggliding, íshokki, jettskí ítróttur, karate, stríðsítrótti av einum hvørjum slagi, motorkappingar (øll sløg), ríðing, paragliding, parasailing, polo, rugby, skíflúgving, skílop, sveimaflúgving, rannsakan av hellum og holum, vatnskí, white water ítrotti ella øðrum vandafullum tiltøkum.

**7.3.9** Tryggingin fevnir ikki um AIDS-staðfestar persónar.

## 7.4 Rindan av endurgjaldi

Avlamnisendurgjald verður útgoldið tryggjaða, hvørs treyt fyri útgjaldi er, at tryggjaði er á lívi, tá endurgjaldið verður kravt. Endurgjald til ómyndugar persónar verður goldið samsvarandi reglunum um ómyndug.
Doyr tryggjaði orsakað av vanlukku-tilburðinum, verður deyðsendurgjaldið goldið næsta avvarðandi, uttan so, at annað er skrivliga fráboðað og góðkend av felagnum. Við næstu avvarðandi eru at skilja hjúnarfelagi ella børn ella arvingar sambært testamenti ella lóg.

## 7.5 Ásetan av endurgjaldið við avlamni

**7.5.1** Avlamnisendurgjaldið er avlamnisstigið í prosentum av tryggingarupphæddini. Avlamnisendurgjaldið kann ikki fara uppum 100% Avlamnisstigið verður ásett eftir tí læknaliga avlamnisstiganum uttan mun til starv tryggjaða, og so skjótt tað er læknaliga gjørligt, tó ikki seinni enn 3 ár eftir vanlukkutilburðin. Versnar støðan líðandi, verður endaliga endurgjaldið ásett samsvarandi tí avlamni, sum ítøkiliga kann staðfestast tann dagin, 3 ár eru liðin eftir vanlukkuna.

### 7.6 Gerðarrættur

Avlamnisstigið kann, um tryggjaði krevur tað, endaliga ásetast av Arbejdsskadestyrelsen í Danmark. Útreiðslurnar í hesum sambandi verða býttar javnt millum tryggjaða og felagið.

### 7.7. Treytir, tá ið skaði er

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

## 8. Privat ábyrgd

Tryggingin veitur fulnað, um so er, at tryggjaði sum privatpersónur á ferðini fær álagt endurgjaldsábyrgd, ella um so er, at krav av órøttum verður reist móti tryggjaða.
Tryggingin veitir ikki fulnað fyri vinnuábyrgd t.v.s. ábyrgd, sum tryggjaði fær álagt í samband við útinnan av vinnu.
Tryggingin veitur fulnað sambært galdandi rætti í tí landi, har skaðin hendir, og við niðanfyri nevndu upphæddum, sum er hægsta ábyrgd felagsins íroknað útreiðslur av einum og hvørjum slagi eftir ein skaðatilburð, uttan mun til, um ábyrgdin verður áløgt fleiri, og uttan mun til, um fulnaður er sambært eini ella fleiri tryggingarskjølum í felagnum.

| **Privatábyrgd** | |
|---|---|
| | **Upphæddir** |
| **Persónsskaðar** | **DKK 5.000.000** |
| **Tingskaðar** | **DKK 2.000.000** |

### 8.1 Hvørjar útreiðslur svarar tryggingin fyri

**8.1.1** Ta upphædd, tryggjaði verður álagdur at gjalda vegna endurgjaldsábyrgd fyri skaða á persón ella lut.

**8.1.2** Útreiðslur í sambandi við uppgerð av endurgjaldsspurningum, sum eru íkomnar eftir avtalu við Gouda.

**8.1.3** Skaðar á hotell ella leigaða íbúð umframt innbúgv í íbúðini við upp til DKK 25.000 fyri ferðina og við eini sjálvsábyrgd uppá DKK 500 fyri hvønn skaða.

### 8.2 Tryggingin svarar ikki fyri endur-gjaldsábyrgd tryggjaða

**8.2.1** Í sáttmálaviðurskiftum.

**8.2.2** Í vinnu- ella starvsviðurskiftum.

8.2.3 Orsakað av, at tryggjaði við avtalu ella á annan hátt hevur átikið sær eina ábyrgd, ið gongur longur enn ábyrgd tryggjaða eftir vanligum reglum fyri endurgjaldsábyrgd uttanfyri sáttmálaviðurskifti.

**8.2.4** Fyri skaða á lutir, sum ikki eru fevndir av stk. 8.1.3, og sum tryggjaði eigur, hevur til láns, leigu, í varðveitslu, til nýtslu, flutning, virkingar ella viðgerðar, hevur fingið sær ræði á ella hevur í varveitslu av aðrar orsøk.

**8.2.5** Fyri skaða, elvdur av hundum.

**8.2.6** Fyri skaða, sum stendst av, at tryggjaði við smittu ella á annan hátt hevur volt øðrum sjúku.

**8.2.7** Fyri skaða, voldur í samband við nýtslu av:

a) Motorakfari, kamping-/viðfestisvogni, luftfari.

b) Sjófari, sum er 3 metur ella longri við segli ella motori, ella sjófari undir 3 metrar, um so er, at motororkan er omanfyri 5 HK.

### 8.3 Tryggingin svarar haraftrat ikki fyri

**8.3.1** Bøtir ella líknandi krøv.

**8.3.2** Um so er, at skaðin er elvdur av tryggjaða í sjálvgjørdum rúsi, og rúsurin er týðandi orsøk til skaðan.

### 8.4 Treytir, tá skaði er

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felags-ásetingunum undir 19. parti.

Tryggjaði kann ikki við bindandi virknaði fyri felagið hvørki heilt ella partvíst viðurkenna endurgjaldsábyrgd fyri skaða, sum er voldur ella gera avtalu um endurgjald.

## 9. Rættarhjálp

Tryggingin rindar útreiðslur til rættarmálskostnað í sambandi við ávísar privatar rættartrætur á ferð tryggjaða umframt møguligar ferðaútreiðslur, sum eru neyðugar, um so er at tryggjaði skal avhoyrast sum vitni ella partur í sambandi við eitt rættarmál í útlandinum, sum eru íkomið á eini frítíðarferð í tryggingartíðarskeiðinum.

| Rættarhjálp | |
|---|---|
| | **Upphæddir** |
| **Útreiðslur** | **DKK 75.000** |
| **Trygdarveiting rentufrítt lán í 1 mánaða** | **DKK 50.000** |

Samlaða skaðaútreiðslan kann ikki fara uppum nevndu endurgjaldsupphæddirnar, sum eru hægstu mørk felagsins fyri endurgjaldi í samband við skaðatilburð.

## 9.1 Tryggingin svarar fyri

Fyri fulnaðin eru galdandi vanligu treytirnar fyri rættarhjálp og familjutryggingar við innbúgvi hjá "Rådet for Dansk Forsikring og Pension", við niðanfyri nevndu frávikum í samband við rættar- og gerðarrættarmál, sum eru íkomin av trætumálum á ferðini.

**9.1.1** Tryggingin rindar rímuligar og neyðugar ferðaútreiðslur í samband við rættar- ella gerðarættarmál:

a) Har tryggjaði skal vera hjástaddur, fyri at málið kann fremjast, og har tryggjaði er boðsendur av rættinum til avhoyringar sum partur.

b) Har tryggjaði er boðsendur sum vitni og tryggaði hevur ein rættarligan áhuga í at geva vitnisfrágreiðing í útlandinum, og at tað ikki ber til at hava vitnisavhoyringina í Føroyum.

**9.1.2** Tryggingin svarar haraftrat fyri veitan av trygd:

a) T.v.s gjalding, sum antin varandi ella fyribils kann loysa tryggjaða ella ognarlutir hansara úr afturhaldi myndugleika.

b) Trygd verður veitt mótvegis tryggjaða sum eitt rentufrítt lán, sum skal afturgjaldast sum skjótast eftir heimkomuna til Føroya ella trygdin verður leysgivin. Rentufría lánið skal tó í seinasta lagi verða afturgoldið felagnum innan 1 mánaða eftir, at trygdin er veitt.

c) Verður hald lagt á trygdina, og er hetta orsakað av at tryggjaði ikki rindar møguligar bøtir ella endurgjal, ella tí at tryggjaði ikki møtir ella ikki møtir rættstundis til rættarfundir, ella tryggjaði á annan hátt hevur ábyrgd fyri at hald verður lagt á trygdina, skal veitta trygdin beinanvegin afturrindast felagnum.

## 9.2 Sjálvsábyrgd

Í samband við ein hvønn skaða undir rættarhjálp, tó veitan av trygd undantikið, rindar tryggjaði eina sjálvsábyrgd, sum er 10% av samlaðu útreiðslunum, tó í minsta lagi DKK 2.500,00.

## 9.3 Tryggingin svarar ikki fyri

Tryggingin svarar ikki fyri útreiðslu í samband við:

**9.3.1** Verulig endurgjøld, bøtir ella krøv, ið líkjast bót.

**9.3.2** Rættar- ella gerðarrættarmál, sum hava uppruna í sáttmála- vinnu ella arbeiðsviðurskiftum.

**9.3.3** Rættar ella gerðarrættarmál, sum standast av skaða á lutir, sum ikki eru fevndir av stk. 8.1.3 og sum tryggjaði eigur, hevur til láns, leigu, í varðveitslu, til nýtslu, flutning, virkingar ella viðgerðar, ella hevur í varðveitslu av aðrari orsøk.

**9.3.4** Rættar- ella gerðarrættarmál orsakað av skaða, sum stendst av, at tryggjaði við smittu ella á annan hátt hevur volt øðrum sjúku.

**9.3.5** Rættar ella gerðarrættarmál fyri skaða elvdur av ella um narkotika.

**9.3.6** Mál, sum ikki eru íkomin á ferðini í tryggingratíðarskeiðinum.

**9.3.7** Skaðar, sum eru elvdir av tryggjaða í sjálvgjørdum rúsi, og rúsurin er ein viðvirkandi orsøk til skaðan.

**9.3.8** Veitan av trygd í málum viðvíkjandi sáttmála- vinnu og arbeiðsviðurskiftum. Heldur ikki í revsimálum.

## 9.4 Treytir, tá ið skaði er

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.
Treytirnar fyri rættarhjálp kunnu útvegast hjá felagnum.

## 10. Endurgjaldsferð

Tryggingin rindar útreiðslur til eina endurgjaldsferð fyri eitt fólk, sum ávíst í yvirlitinum niðanfyri, um so er at ferð og uppihald verða oyðløgd smb. 10.1.1, 10.1.2 og 10.1.3.

Fyri fulnaðin eru galdandi hesar endurgjaldsupphæddir:

| Endurgjaldsferð | |
|---|---|
| | **Upphæddir** |
| **Endurgjaldsferð, hægsta upphædd** | **DKK 50.000** |
| **Bústaðarútreiðslur í mesta lagi pr. dag** | **DKK 1.000** |
| **Í mesta lagi pr. viku** | **DKK 6.000** |

### 10.1 Nær veitur tryggingin fulnað

Tryggjaði hevur rætt til endurgjaldsferð, tá:

**10.1.1** Tryggjaði verður boðsendur at koma heim smb. 5. parti Heimkalling, í fyrru helvt av ætlaðu ferðatíðini, smb. tó 5.1.6.

**10.1.2** Tá tryggjaði á ferðini verður fyri bráðkomnari sjúku ella skaða, sum er fevndur av 2. parti Sjúka.
Tað er ein treyt, at tryggjaði er lagdur inn á sjúkrahús í minsta lagi helvtina av tíðini ferðin varir – ella av lækna hevur fingið boð um at liggja í songini í minsta lagi helvtina av tíðini ferðin varir. Seingjalega, sum lækni hevur givið boð um, verður í fyrsta lagi roknað frá tí at tryggjaði hevði fyrstu vitjan av lækna uttan mun til møguliga seinking av vitjanini.

**10.1.3** Tryggjaði má flytast heim smb. 3. parti. Tað er ein treyt, at sjúkan ella skaðin antin hava við sær heimflutning í fyrru helvt av ætlaðu frítíðini, ella hevur við sær heimflutning í framhaldi av innlegging á sjúkrahúsi í fyrru helvt av ætlaðu ferðatíðini.

### 10.2 Uppgerð av endurgjaldinum:

**10.2.1** Fyri leiguferðir og aðrar "pakkaferðir" verður í mesta lagi veitt endurgjald svarandi til ta upphædd, tryggjaði, sum raktur verður av sjúku, skaða ella heimkallinig, hevur goldið tí, sum skipar fyri ferðini, tryggingar ikki íroknaðar.

**10.2.2** Fyri aðrar ferðir, t.d. bilferðir, verður veitt endurgjald svarandi til tær flutningsútreiðslur, sum svara til ferðaútreiðslurnar fyri tryggjaða, sum er raktur av sjúku, skaða ella heimkalling.

**10.2.3** Flutningsútreiðslur fyri koyring í bili verða roknaðar fyri hvønn koyrdan kilometur eftir stytstu leið frá danska markinum til frítíðarstaðið og aftur, og upphæddin verður gjørd upp samsvarandi taksti hjá landinum fyri tænastukoyring í egnum bili omanfyri 12.000 kilometrar um árið.

**10.2.4** Fyri aðrar ferðir enn leiguferðir og "pakkaferðir" verður haraftrat fulnaður veittur fyri goldnar, skjalprógvaðar útreiðslur til bústað. Aftrat øllum omanfyri nevndu endurgjøldum vera lagdar útreiðslur av ferðini millum Danmark og Føroyar.

### 10.3 Endurgjald verður ikki veitt fyri

**10.3.1** Eina ferð, tá skaðin er hendur meðan tryggjaði hevur útint okkurt av teimum undantøkum, sum nevnd eru í 7.3.8.

**10.3.2** Ískoytisveitingar, sum ikki eru bílagdar og goldnar heimanífrá, og sum ikki hava kunna verið nýttar grundað á skaða, sum fulnaður er veittur fyri, og sum ikki hava fingist endurgoldnar av ferðafyriskiparanum.

**10.3.3** Endurgjaldsferð, um so er at fulnaður er fingin fyri returferð udir 4. parti Heimkalling og/ella 5. parti Sjúkrafylgja.

**10.3.4** Endurgjaldsferð í samband við skaðatilburð, sum ikki er fevndur av hesi trygging.

**10.3.5** Endurgjaldsferð verður ikki veitt í samband við skaðatilburð, sum hevur við sær brot, skaða á liðbond ella líknandi skaða, tó undantikið skaða, sum samstundis hevur við sær innlegging á sjúkrahús ella seingjalegu, eftir boðum frá lækna í minsta lagi helvtina av tíðini, ferðin varir.

## 11. Seinka uppmøting

Tryggingin rindar eyka útreiðslur, sum standast av, at tryggjaði skal fullføra ferðaleið sína ella byrja ferðina um so er, at tryggjaði av óuppibornum og óvæntaðum orsøkum møtir ov seint til alment flutningsfar ella flutningsfar sum er fyriskipa av tí, sum hevur lagt ferðina til rættis.

Fyri fulnaðin er galdandi hesar upphæddir, sum eru hægsta mark felagsins fyri endurgjaldsábyrgd í sambandi við ein skaða, uttan mun til talið á tryggjaðum sambært tryggingarskjalinum:

| **Seinka uppmøting** | |
|---|---|
| | **Upphæddir** |
| **Fyri at fullføra ferðina** | **DKK 15.000** |
| **Matur og hotell pr. dag** | **DKK 1.500** |

## 11.1 Tryggingin svarar fyri

Tryggingin svarar fyri rímuligum og neyðugum eykaútreiðslum til flutning, mat og hotell, um so er, at tryggjaði av óuppibornum og óvæntaðum orsøkum møtir ov seint til alment flutningsfar ella flutningsfar, sum er útvegað av tí, sum skipar fyri ferðini, og av teirri orsøk annaðhvørt ikki kann byrja ella fullføra ferð sína, og tí skal fáa fatur aftur á ferðalagnum, Tað er ein treyt fyri fulnaði, at ferðaseðlarnir eru bílagdir og goldnir seinstast 18 tímar frammanundan fráferð, og at ásett er uppihald uppá í minsta lagi 12 tímar á fyrsta steðgi uttanfyri Føroyar.

## 11.2 Treytir, tá ið skaði hendir

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

# 12. Viðføri og viðførisseinking

## 12.1 Tryggingin svarar fyri

Tryggingin svarar fyri privatum ognarlutum hjá tryggjaða, sum eru tiknar við heimanífrá ella eru komnar aftrat á ferðini. Hetta fevnir m.a. um hesar lutir og við nevndu upphæddum:

| **Viðføri og viðførisseinking** | |
|---|---|
| | **Upphæddir** |
| **Viðføri** | **DKK 10.000** |
| **Viðførisseinking** | **DKK 800 um samdøgrið, í mesta lagi DKK 3.200** |

**12.1.1** Reiðupeningur, ferðakekkar, virðisbrøv í mesta lagi við DKK 1.000

**12.1.2** Ferðaseðlar og pass við í mesta lagið DKK 1.000

**12.1.3** Prýðislutir, myndaútgerð, sjónbandaútgerð og fartelefon við í mesta lagi DKK 2.500, tilsamans tó í mesta lagi DKK 1.250 fyri hvønn lutin.

## 12.2 Tryggingin svarar ikki fyri hesar lutir

**12.2.1** Húsvognar, bilar, motorsúkklur, súkklur, bátar, windsurfe-bretti o.t., umframt tilhoyr til hesi.

**12.2.2** Lutir sum verða sendir fyri seg, av tí at hesir ikki eru fevndir av tryggingini, fyrr enn teir eru heintaðir av tryggjaða.

**12.2.3** Vinnulig útgerð.

## 12.3 Skaðatilburðir, fevndir av tryggingini:

Tryggingin svarar fyri missi og/ella skaða av privata viðføri tryggjaða í hesum førum:

**12.3.1** Tjóvarí úr læstum hotellrúmi og/ella trygdarrúmi og úr læstum viðførisrúmi í motorakfari.

**12.3.2** Tjóvarí, sum er at roknað sum rán, t.v.s. sum tryggjaði hevur varnast í tí løtu, tað fór fram.

**12.3.3** Skaði orsakað av eldi ella vatni.

**12.3.4** Missur, skaði og/ella umbýti av innskrivaðum viðføri, tó lutirnir nevndir í 12.1.1, 12.1.2 og 12.4.2 undantiknir. Viðføri er tó ikki at meta sum burturmist, fyrr enn flutningsfelagið sigur frá, at leitingin er steðgað, og at viðførið ikki er funnið. Hjá nøkrum flutningfeløgum kann hetta taka upp til 4 vikur.

**12.3.5** Vanligt tjóvarí, t.v.s tjóvarí, sum ansað ikki verður eftir í tí løtu, tað fer fram, tó undantikin reiður peningur, ferðakekkar, virðisbrøv, sum nevt undir 12.1.

## 12.4 Tryggingin rindar ikki skaðatilburðir orsakað av

**12.4.1** Skaða á viðføri orsakað av vánaligari innpakking ella vætu, sum lekur út, umframt slit ella líðandi ellisbrek, skøvur, skeinur og lasafarin kuffert ella líknandi, hvørs brúksvirði er mest sum óbroytt.

**12.4.2** Misnýtsla av kredittkortum og ferðakekkum, og missur, ið stendst av hesum. Tó verða goldnar útreiðslur til at seta seg í samband við tann, ið hevur skrivað út kortið, fyri at steingja tað, umframt møgulig gjøld fyri útvegan av nýggjum korti við upp til DKK 1.000 fyri øll kort.

**12.4.3** Stuldur av lutum, sum standa uttan eftirlit, av tí at tryggjaði ikki má fara frá tryggjaðu lutum, heldur ikki eina lítla løtu, um so er, at teir ikki eru læstir inni í íbúð, viðførisrúmi í motorakfari, viðføriskassa ella líknandi.

**12.4.4** Gloymdum, mistum ella misløgdum lutum.

### 12.5 Uppgerð av endurgjaldinum

Lutir, sum eru keyptir nýggjir, eru óskaddir og eru niðanfyri 2 ára gamlir, verða endurgoldnir við teirri upphædd, sum samsvarandi nýggir lutir kosta. Lutir, sum eru omanfyri 2 ár, keyptir sum brúktir ella frammanundan hava skaða, verða endurgoldnir við dagsvirði, t.v.s. prísinum fyri at keypa teir aftur við frádrátti av virðisminking orsakað av aldri, nýtslu, minkaðum nýtsluvirði ella øðrum umstøðum.

Felagið kann velja, um skaddir lutir skulu gerast aftur ella at gjalda eina upphædd svarandi til umvælingarkostnaðin. Felagið hevur rætt, men ikki skyldu til at endurgjalda in natura.

### 12.6 Treytir, tá ið skaði hendir

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

**12.6.1** Fyri lutir nevndir undir 12.1.1, 12.1.2 og 12.1.3 er ein treyt fyri fulnaði, at tryggjaði hevur lutirnar við sær sum handviðføri.

**12.6.2** Tað er ein treyt fyri endurgjaldsábyrgd felagsins, at tryggjaði, tá tjóvari fer uppum DKK 1.500, meldar tilburðin til nærmastu løgreglustøð, og kann vísa fram upprunakvittan um fráboðanina. Ber hetta ikki til, kann boðast frá hjá Gouda, felagnum ella tí, sum skipar fyri ferðini.

**12.6.3** Skuldi tað hendingaferð ikki borið til hjá tryggjaða at boða frá tjóvarínum á ferðini, skal tilburðurin fráboðast so skjótt, sum høvi býðst, og seinst beint eftir heimkomu til Føroya.

**12.6.4** Tá innskrivað viðføri verður burturmist, skal flogfelag ella annað flutningsfelag fráboðast. Kvittan fyri fráboðanina skal sendast til Gouda í uppruna skjali PIR (Property Irregularity Report) e.t.

**12.6.5** Kemur skaði á lutir, skulu hesir ikki beinast burtur, fyrrenn Gouda hevur givið loyvið til tess. Tryggjaði skal, um tað verður kravt, senda Gouda skaddu lutirnar.

**12.6.6** Fulnaðurin fevnir ikki um miss, sum er fevndur av aðrari trygging.

### 12.7 Fulnaður fyri viðførisseinking

**12.7.1** Verður viðføri hjá tryggjaða, sum er innskriva, seinkað meir enn 5 tímar í mun til komu tryggjaða til ferðamálið uttanfyri Føroyar, rindar tryggingin rímiligt endurgjalskeyp av neyðugum lutum, so sum toilettlutum og klæðum,

**12.7.2** Tað er ein treyt, at tryggjaði kann vísa uppruna skjalprógv fyri seinkingina frá flutningsfelagnum og/ella ferðamannastovuni.

**12.7.3** Tryggingin rindar ikki fyri endurgjaldskeyp, sum verður gjørt eftir at viðførið er komið til ferðamálið.

## 13. Flutningsseinking

### 13.1 Tryggingin svarar fyri

Fulnaður og upphæddir, sum eru evstu mørk í sambandi við skaðatilburð:

| Flutningsseinking | |
|---|---|
| | **Upphæddir** |
| **Rímuligar útreiðslur til mat og innivist** | **Um samdøgrið DKK 800, tó í mesta lagi DKK 3.200 fyri øll tey, sum eru seinkað.** |

**13.1.2** Er tað flutninstól, sum ferðasfyriskiparin nýtir, seinkað í meira enn 8 tímar, tá komið verður til ferðamálið uttanlands ella við heimkomu til Føroya, fevnir tryggingin um skjalprógvaðar neyðugar og rímuligar eykaútreiðslur til mat og møguliga gisting.

**13.1.3** Tað er ein treyt fyri fulnaði, at útreiðslurnar eru goldnar, har seinkingin hevur verið, og tær verða bert endurgoldnar móti fyrivísan av uppruna kvittan.

**13.1.4** Seinking verður roknað í mun til vanligu ferðætlanina hjá ferðaskrivstovuni ella flutningfelagnum við teimum broytingum, sum vóru fráboðaðar, áðrenn ferðin byrjaði.

**13.1.5** Endugjaldsskyldan er treytað av, at seinkingin stendst av veðri ella tekniskum viðurskiftum.

**13.1.6** Hesin fulnaður tekur tó bert við, um so er at ferðafyriskiparin ella onnur ikki hava skyldu til at

veita endurgjald ella í veruleikanum veita endurgjald.

# 14. Frítíðaríbúðartrygging

## 14.1 Tryggingin svarar fyri

Fulnaður og upphæddir, sum eru felagsins hægstu mørk í skaðaføri:

| **Frítíðaríbúðartrygging** | |
|---|---|
| | **Upphæddir** |
| **Eyka útreiðslur til annan bústað fyri allar tryggjaðar persónar** | **Upp til DKK 1.000 pr. samdøgur, í mesta lagi DKK 6.000 pr. viku** |

**14.1.1** Tryggingin rindar útreiðslur til leigu av líknandi frítíðaríbúð ella útreiðslur til hotelluppihald, um so er at leigaði frítíðarbústaðurin er ella gerst ikki búgvandi í orsakað av eldi ella vatnskaða, vatnflóð, jarðskjálvta ella líknandi náttúruvanlukku.

**14.1.2** Hesin fulnaður tekur tó bert við, um ferðafyriskiparin ella útleigarin ikki hava skyldu til at vísa á annan bústað.

**14.1.3** Endurgjaldið verður gjørt upp samsvarandi skjalprógvaðum goldnum eyka útreiðslum til annan bústað, smb. yvirlitið.

## 14.2 Treytir, tá ið skaði hendir

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

# 15. Krígsvandi/burtur-flyting

Fulnaður og upphæddir, sum eru felagsins hægstu mørk í sambandi við skaðatilurð:

| **Krígsvandi og burturflyting** | |
|---|---|
| | **Upphæddir** |
| **Eyka útreiðslur til uppihald og flutning** | **Í mesta lagi DKK 50.000** |
| **Eyka útreiðslur til mat** | **Í mesta lagi DKK 500 pr. samdøgur** |

Tryggingin rindar fyri burturflyting av tryggjaða, um so er, at krígslíknandi støða berst á, har tryggjaði er. Fulnaður er treytaður av, at tryggjaði fer frá staðnum so skjótt, sum høvi býðist, og haraftrat fylgir tilmælinum frá donsku myndugleikunum.

Felagsins endurgjaldsábyrgd er haraftrat treyta av, at ferðast ikki verður til eitt land sum, tá farið varð avstað, er í líknandi støðu sum nevnt omanfyri, og at tryggjaði ikki sjálvur luttekur í tiltøkunum.

## 15.1 Fulnaður

**15.1.1** Tryggingin rindar útreiðslur til burturflyting og /ella eyka útreiðslur til møguliga heimferð úr einum øki, har kríggj brestur á, ella har hóttandi vandi er fyri kríggi ella krígslíknandi støðu, meðan tryggjaði er í økinum.

**15.1.2** Tryggingin rindar haraftrat fyri miss ella skaða á viðføri, sum tryggjaði letur standa eftir orsakað av burturflytingini, tó í mesta lagi innanfyri galdandi fulnaðar upphædd fyri viðføri.

**15.1.3** Tað er ein treyt, at danska uttanríkisráðið mælir til eina tílíka burturflyting ella heimferð. Um so er, er tað ein treyt, at tryggjaði, um umstøðurnar loyva tí, beinanvegin fer úr økinum, eftir at tilmælið er komið.

**15.1.4** Verður tryggjaði hildin aftur av myndugleikunum í einum landi orsakað av kríggi, rindar tryggingin í upp til 3 mánaðar tær skjalprógvaðu kravdu eyka útreiðslur til uppihald, heruppií útreiðslur til flutning innanlands, við teimum í yvirlitinum ásettu upphæddinum.

**15.1.5** Tað er ein treyt fyri hesum fulnaði, at tryggjaði ikki frammanundan hevur latið vera við at fylgja einum tilmæli um burturflutning frá danska uttanríkismálaráðnum ella fráboðan frá Gouda.

## 15.2 Treytir, tá ið skaði hendir

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

# 16. Kreppuhjálp

Tryggingin rindar fyri kreppuhjálp til tryggjaða, sum á ferðini verður fyri størri vanlukku ella hending, sum ger tað neyðugt við bráðfeingishjálp.

## 16.1 Hvat svarar tryggingin fyri

Tryggingin svarar fyri kreppuhjálp til tryggjaða um tørvur er á bráðfeingis sálarligari hjálp íkomin av:
Ráni, álopi og hóttanum, vanlukku, herundir ferðsluvanlukku, eldi, spreinging ella innbroti,

álvarslig sjúka/deyði. Gouda ger av, um kreppuhjálp skal setast í verk, ið sum meginregla verður gjørd í sambandi við størri vanlukkur ella ógvusligar hendingar.
Kreppuhjálp, sum kemur undir henda fulnað, verður veitt av krepputoymi hjá Gouda og fevnir um kreppuhjálp á staðnum, og sum í seinsta lagi endar, tá tryggjaði kemur aftur til Føroya.

### 16.2 Treytir, tá ið skaði hendir

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

## 17. Sálarfrøðihjálp

Viðtala hjá sálarfrøðingi ella sálarlækna í Føroyum og/ella uttanlands við upp til DKK 2.500 í førum, har tryggjaði hevur verið fyri álvarsligari sjúku, álvarsligum skaða, neyðtøku, álop, ráni ella líknandi skelkandi uppliving á ferðini, og tilvísing er frá egnum lækna ella frá læknanum hjá Gouda.

Í samband við allar skaðatilburðir skal tryggjaði venda sær til Gouda, sum tekur avgerð í málinum. Sí vinarliga vanligu felagstreytirnar í 19. parti.

### 17.1 Hvat svarar tryggingin fyri

Tryggingin svarar fyri kreppuhjálp til tryggjaða um tørvur er á bráðfeingis sálarligari hjálp íkomin av:
Ráni, álopi og hóttanum, vanlukku, herundir ferðsluvanlukku, eldi, spreinging ella innbroti, álvarslig sjúka/deyði. Gouda ger av, um kreppuhjálp skal setast í verk, ið sum meginregla verður gjørd í sambandi við størri vanlukkur ella ógvusligar hendingar.
Kreppuhjálp, sum kemur undir henda fulnað, verður veitt av krepputoymi hjá Gouda og fevnir um kreppuhjálp á staðnum, og sum í seinsta lagi endar, tá tryggjaði kemur aftur til Føroya.

### 17.2 Treytir, tá ið skaði hendir

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

## 18. Virkni-ítrottur, Ískoytisfulnaður

### 18.1 Hvat fevnir tryggingin um

Um tryggingin er víðkað til at fevna um hesar ítrottargreinir:

**18.1.2** Alpinska skíðrenning, amerikanskan fótbólt, ballónferð, boksing, bungy jump, glíming, kaving, fikting, hanggliding, íshokki, judo, karate, parasailing, polo, ríðing, rannsakan av hellum og holum, vatnskíð, white water ítrott, rindar tryggingin uttan mun til undantøkini í stk. 7.3.8, 10.3.1 og vanligum treytum í 19. Parti.
Fulnaður og upphæddir, sum eru evstu mørk hjá felagnum í skaðatilburði:

| **Ískoytisfulnaður** | |
|---|---|
| **Um endurgjaldsferð verður veitt:** | **DKK 200 pr. dag** |
| **Um eingin endurgjaldsferð verður veitt:** | **DKK 500 pr. dag** |
| **Ætlað tiltøk og leigaðir lutir sum peningur ikki er fingin aftur fyri** | **DKK í mesta lagi 2.000** |

### 18.2 Útreiðslur fevndar av tryggingini:

Um so er, at tryggjaði ikki er førur fyri at vera við í ætlaða tiltakinum vegna bráðkomna sjúku, sum er fevnd av tryggingini ella skaða, sum er íkomin á ferðini, rindar tryggingin hesar útreiðslur:

**18.2.1** Endurgjaldsferð sambært teimum treytum, avmarkingum og undantøkum, sum ásettar eru í 10. parti. Endurgjaldsferð uttan mun til undantakið í 10.3.1.

**18.2.2** DKK 500 fyri hvønn dag, um tryggjaði ikki er førur fyri at útinna ætlaða tiltakið, um so er, at tryggjaði ikki hevur rætt til endurgjaldsferð sambært 10. parti.

**18.2.3** DKK 200 fyri hvønn dag tryggjaði ikki er førur fyri at útinna tað ætlaða tiltakið, um so er, at tryggjaði hevur rætt til eina endurgjaldsferð sambært 10. parti.

**18.2.4** Upp til DKK 2.000 í endurgjaldi fyri goldnar skjalprógvaðar útreiðslur til ætlað tiltøk og leigaða ítrottarútgerð, sum tryggjaði ikki kann fáa afturgoldið.
Endurgjald fyri dagarnar verður veitt frá degnum eftir, at tryggjaði hevur søkt sær læknahjálp, uttan mun til orsøkina fyri eini møguligari seinking, og til ta fyrstu av hesum løtum:
**18.2.5** Seinsti dagur, sum tryggjaði ikki kann útinna tiltøkini orsakað av sjúku/skaða.

**18.2.6** Ætlaði heimkomudagurin.

**18.2.7** Tann dagurin tryggingin gongur út.

### 18.3 Treytir, tá skaði hendir

Tað er ein treyt fyri fulnaði, at sjúkan ella skaðin kann krevjast goldin samsvarandi fulnaði eftir hesi trygging undir 2. parti Sjúku og skaða, umframt at viðgerandi læknin á frítíðarstaðnum váttar, at ætlaða tiltakið ikki kann fremjast orsakað av sjúku ella skaða.

Tá skaði er, skal tryggjaði beinanvegin seta seg í samband við Gouda.
Sí vinarliga vanligu treytirnar í felagsásetingunum undir 19. parti.

## 19. Felagstreytir

Sum ferðandi kunnu tygum fáa tørv á svari uppá spurningar, bæði áðrenn tygum fara úr Føroyum og á ferðini.
Vit hava gjørt av at samarbeiða við Gouda fyri at hjálpa tygum so væl sum til ber, bæði áðrenn tygum fara og á ferðini. Hjá Gouda kunnu tygum fáa hjálp á staðnum, uttan mun til, hvar tygum eru staddur.
Áðrenn tygum fara og á ferðini kunnu tygum tó frítt og trygt ringja til Gouda.

### 19.1 Tænsta áðrenn fráferð

Tygum kunnu fáa upplýsingar um øll týðandi viðurskifti á ferðamálinum viðvíkjandi heilsuviðurskiftum, koppingarviðurskiftum, læknum og sjúkrahúsinum í økinum og nærmasta Gouda umboði.
Tygum kunnu ringja til Gouda og fáa kunnleika um tryggingartreytir í sambandi við møguliga varandi sjúku, áðrenn farið verður úr Føroyum.
**Leggið vinarliga til merkis 2. part stk. 2.2.16 og 2.2.17.**

### 19.2 Heilivágur-tænasta

Um tygum á ferðini missa heilivág, sum lækni hevur ásett, ella verður heilivágurin uppi, kunnu tygum ringja til Gouda, sum vil hjálpa tygum við at útvega nýggjan heilivág á staðnum ella at finna annan møguleika til tygara nýtslu.

### 19.3 Boðtænastan

Um tygum hava tørv á bráðfeingishjálp til at seta tygum í samband við fólk, feløg, bankar ella líknandi, kunnu tygum seta tygum í samband við Gouda, sum fer at hjálpa tygum.

### 19.4 Sjúka og heimflutninguri – tænasta

Gerast tygum sjúkur ella koma tygum til skaða á ferðini, eiga tygum at seta tygum í samband við Gouda. Her fáa tygum hjálp at velja lækna, møguligt sjúkrahús og innlegging og til møguliga veitan av trygd í sambandi við innleggingina.
Gouda syrgir fyri, at lækni ansar eftir viðgerðini og støðugt metir um dygdina. Gouda setur seg eisini í samband við avvarðandi tygara og syrgir fyri neyðugari kunning. Læknin hjá Gouda metir um, hvørt tygum skulu flytast heim ella tygum skulu flytast til annað hóskandi viðgerðarstað á ferðini.
Í sambandi við flutning, fer starvsfólk við læknaligari útbúgving at fylgja tygum, um tað verður hildið neyðugt. Gouda syrgir fyri, at flutningurin gongur so væl sum til ber, og at tygum altíð kunnu líta á, at neyðug læknalig útgerð og fullgóðir flutningshættir eru tøkir.
Gouda tekur sær av øllum útreiðslum og syrgir fyri at tær verða goldnar.

### 19.5 Skaðatænasta

Ringið ella sendi fax, tá tygum tørva bráðfeingishjálp. Tygum kunnu fáa samband við Gouda alt samdøgrið og allar dagar, uttan mun til, har ið tygum ferðast.

### 19.6 Virkin skaðahjálp

Gouda skipar fyri skaðatænastu á staðnum. Tað merkir, at skaði, sum fulnaður er fyri, kann vera heilt ella lutvíst avgreiddur á ferðini.
Endurgjaldið kann vera avmarkað og treytað av bráðfeingis fíggjaliga tørvinum, av tí at endaliga skaðaviðgerð fer fram, tá tygum eru komin heimaaftur á ferðini. Virkin skaðahjálp merkir tí ein fyribils avgreiðsla av øllum skaðum, sum heilt ella lutvíst kunnu avgreiðast á staðnum.
Útgoldin virkin skaðahjálp, sum fer fram á staðnum, har tygum eru, verður mótroknað í endaligu skaðauppgerðini, sum verður gjørd aftaná heimkomuna.

### 19.7 Hjálp, tá skaði er

Tørva tygum bráðfeingishjálp orsakað av álvarsligari sjúku, álvarsligum skaða ella týðandi viðførisskaða, eiga tygum at seta tygum í samband við:
Trygd Emergency Centre (24 hours)
Tel. +45 44 25 81 00
Fax +45 33 15 60 61
Svarar alt samdøgrið.

### 19.8 Skaðaviðgerð og skaðafráboðan

Allir skaðar verða viðgjørdir av Trygd Emergency Centre, og skaðafráboðan skal uttan drál sendast til Trygd.
Tryggjaði hevur skyldu til at geva Trygd og Gouda allar upplýsingar, sum kunnu lýsa málið, og hevur skyldu til at fylla út eina skaðafráboðan og – fyri egna rokning- útvega øll neyðug skjøl, heruppí

sjúkradagbøkur, læknafrágreiðingar, uppruna rokningar v.m. umframt at upplýsa, um møguliga trygging í øðrum felag.
Verður tað kravt, skal tryggjaði senda uppruna skjøl sambandi við uppgerð av skaðunum.
Hevur tryggjaði verið viðgjørdur av lækna og /ella fingið sjúkrahúsviðgerð skal hetta vísast á fráboðanini, sum skal upplýsa navn og bústað hjá viðgerðandi lækna og/ella sjúkrahúsi. Tryggjaði hevur skyldu til at útvega allar upplýsingar og skjøl, sum hava týdning fyri málið, heruppií frumrit av løgreglufrágreiðing ella kvittan fyri fráboðan til løgregluna, umframt:
Nágreiniliga frágreiðing um hendingina.
Navn og bústað á øllum persónum, sum hava verið uppí málinum.
Upplýsingar um aðrar tryggingar, sum kunnu veita fulnað fyri skaðanum.
Vitnisfrágreiðingar.
Sundurgeinað uppgerð av skaðunum.
Við fulnaði fyri seinakaða uppmøting skal latast inn til Gouda frumritið av óbrúktum flogferðaseðlum umframt frumrit av ferðaætlanini.

## 19.9 Vanlig undantøk

Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum uttan mun til sinnisstøðu ella ósaknæmi tryggjaða:
Verður elvdur av tryggjaða við vilja ella av grovum ósketni.
Skaði, sum stendst av, at tryggjaði er ávirkaður av rúsdrekka, misnýtslu av heilivági, rúsevnum ella øðrum eiturevnum, uttan so, at tað verður prógvað, at skaðin ikki hevði nakað samband við hesi evni.
Tryggingin fevnir ikki um skaða, sum stendst av, at tryggjaði ella aðrir ferðafelagar luttaka í:
Flúgving við flogskipara ella 2. flogskipara, sum eru tryggjaðir sambært sama tryggingarskjalið.
Alpinsk skíðrenning, amerikanskur fótbóltur, ballónferð, klintring í fjøllum, ella bjørgum, bobbsleðukoyring, boksing, glíming, bungy jump, kaving, fallhjólaútlop, fikting, hanggliding, íshokki, jetskíð ítrottur, judo, karate, motorkappkoyringar (øll sløg), paragliding, parasailing, polo, ríðing, rugby, skíðflúgving, skílop, sveimaflúgving, rannsakan av hellum og holum, ítrottur viðvíkjandi vatnskíð ella white water.
Kanningarferðir og stórdjóraveiði.
Annars vandafullur ítrottur umframt allar yrkisítrottur.
Skaði, sum beinleiðis ella óbeinleiðis stendst av:
Verkafalli, verkbanni, lóghaldi, inndráttir ella aðrari fyriskipan framd av almennum myndugleika, smb. tó 15. part.
Útlát av kjarnorku ella geislavirknum evnum ella stráling frá geislavirknum brennievni ella burturkasti.
Luttøka í revsiverdum atgerðum, luttøka í bardaga, tó sjálvverja undantikin.
Fylgir av vanlukkutilburði, sum tryggjaði er fyri, sum førari ella ferðandi á motorsúkklu, EU prutli ella scootara.
Virkin luttøka í kríggji, uppreistri ella líknandi atgerðum.
Útreiðslur til sjúkra-og føðihjálp, sum koma fyri, tá kvinna er við barn í níggjuna mánaði, ella í samband við fosturtøku (abortus provokatus).
Krav, sum er fráboðað seinni enn 6 mánaðir eftir tilburðin.
Útreiðlsur í sambandi við miss ella skaða á hjálpitól, brillur, kontaktlinsur, hoyritóli v.m.

## 19.10 Fulnaðir frá øðrum

Tryggingin rindar ikki fyri skaða ella útreiðslur, sum eru ella kunnu krevjast frá øðrum, heruppí ferðafyriskipara, flutningfelag ella aðrari trygging. Hendan avmarking viðvíkur ikki fulnaði undir 7. parti Vanlukka.

## 19.11 Tryggingarupphædd

Tær upphæddir, sum nevndar eru í tryggingarskjalinum fyri einstaka fulnaðin, eru hægstu mørk fyri teirri endurgjaldsskyldu, sum felagið ábyrgist fyri og eru galdandi fyri allar tær hendingar, sum kunnu bera á í tryggingartíðarskeiðnum.

## 19.12 Aftursókn

Tá felagið hevur goldið út sambært hesum tryggingarskjali, gongur felagið inn í øll rættindi tryggjaða.

## 19.13 Avhending av endurgjaldskravi

Tryggjaði kann ikki uttan góðkenning frá felagnum veðseta ella avhenda rættindi sambært tryggingini.

## 20. Endurgjaldsyvirlit

| **Fulnaður**<br>(Tryggingargjøld og upphæddir verða prísjavnar við basis í ár 2000) | **Endurgjald** |
|---|---|
| **Sjúka og heimflutningur:**<br>Fevnir um útreiðslur til læknahjálp, uppihald á sjúkrahúsi, heilivág og útreiðslur til viðgerðarstað, heimflutning eftir lidna viðgerð. | Viðgerðarútreiðslur eftir rokning. |
| **Ferðaslit:**<br>Ferðaútreiðslur til heimferðina, um ein verður boðsendur til Føroya, vegna sjúku ella deyðsfall. | Í mesta lagi kr. 50.000,-<br>Børn undir 18 ár hjá tryggjaða hava eisini rætt til endurgjald, um foreldur ella ferðafelagi verða heimkallað. |
| **Fylgi við sjúklingi/tilkallan:**<br>Útreiðslur til at fylgja við einum av teimum tryggjaðu, um hesin verður sjúkur ella fyri álvarsligum óhappi. | Flutningur eftir rokning, uppihald og mat fyri í mesta lagi 3 persónar. Børn undir 18 ár hjá tryggjaða verða eisini send heim um, foreldur ella ferðafelagi verða heimkallað. |
| **Vanlukku:**<br>Í sambandi við óhapp endurgjald fyri varandi mein og við deyða. | Í mesta lagi við deyð kr. 500.000,-<br>Við 100% avlamni í mesta lagi kr. 1.000.000,- |
| **Álop:**<br>Endurgjald við álop eftir somu reglum sum í Føroyum. | Í mesta lagi kr. 500.000,- |
| **Endurgjaldsferð:**<br>Endurrindan fyri nýggja ferð, um ferðin má brótast av orsakað av sjúku ella seingjarlegu, sum varir meiri enn helvtina av ætlaðu ferðini, og tá ið lækni hevur givið boð um viðgerð og seingjarlegu. | Fyri leiguferð verður sama upphædd endurgoldin, su, er goldið til ferðaskrivstovuna. Fyri aðrar ferðir verða íbúðarútreiðslurnar endurgjoldnar við í mesta lagi kr. 1.000,- um dagin ella í mesta lagi kr. 6.000,- um vikuna fyri hvønn persón.<br>Í mesta lagi kr. 50.000,- |
| **Ov sein framkoma:**<br>Neyðugar eykaútreiðslur til flutning, gisting og mat. | Í mesta lagi kr. 15.000,- fyri at gera ferðina.<br>Í mesta lagi kr. 1.500,- til uppihald og mat um dagin. |
| **Privatábyrgd:**<br>Fevnir um ta endurgjaldsábyrgd, sum tryggjaði hevur fyri skaða á persón og/ella lut, sum henda í sambandi við ferðina, umframt skaðar, sum henda á gistingarhúsi ella leigaðum bústaði. | Persónsskaðar í mesta lagi 5 mió. kr. Skaðar á lutir í mesta lagi 2 mió. kr. Upphæddirnar fyri persón-og lutaskaðar er tað mesta, sum felagið veitir í einum skaðatilburði, íroknaðar eru útreiðslur til sakførara, rættarviðgerð o.a. Skaðar á leigaðan bústað ella hotelrúm í mesta lagi kr. 25.000,- |
| **Rættarhjálp/veðseting/borgan:**<br>Fevnir um vegseting-og/ella borgan í sambandi við lántøku, har endurgjaldskrav verður reist móti tí tryggjaða á ferðini, umframt skaðatilburð, íroknað eru útreiðslur til sakførara, rættarviðger o.a. | Sjálvsábyrgdin er kr. 500,- hvørja ferð. Við rættarhjálp í mesta lagi kr. 75.000,-<br>Sjálvsábyrgdin er 10%/10% av teimum samlaðu útreiðslum, tó í minsta lagi kr. 2.500,-. Veðseting fyri rentufrítt lán í mesta lagi 1 mánað kr. 50.000,- |
| **Viðføri/viðførisseinkan:**<br>Endurrindan fyri viðføri, pengar, pass, ferðakekkar og ferðaseðlar. Fevnir um útreiðslur til neyðugt persónligt viðføri, sum verður seinkað meira enn 5 tímar á útferðini. | Viðføri burturmist í mesta lagi kr. 10.000,-<br>Viðførisseinkan í mesta lagi kr. 2.000,- |

| | |
|---|---|
| **Frítíðaríbúðartrygging:**<br>Tá ið tann bílagda frítíðaríbúðin er óbrúkilig, orsakað av eldi, vatnskapa, vatnflóð, jarðskjálvta ella líknandi nátturuvanlukku, verður endurrindað fyri leigu av líknandi íbúð. | Í mesta lagikr. 1.000,- um dagin og í mesta lagi kr. 6.000,- um vikuna fyri øll tey tryggjaðu. |
| **Flutningsseinkan:**<br>Um flutningsseinkanin er meira enn 8 tímar, verður endurrindað fyri útreiðslur til mat og uppihald. | Í mesta lagi kr. 500,- um dagin fyri hvønn persón og í mesta lagi kr. 2.000,- fyri allar tryggjaðu persónarnar. |
| **Kreppuhjálp/sálarlækni:**<br>Tryggingin gevur eftir avtalu við SOS rætt til kreppuhjálp til tryggjaða í samband við rán, álop, vanlukku , eld ella líknandi. | Bráfeingishjálp á staðnum eftir rokning.<br>Tryggingin fevnir um læknaásvísta viðtalu hjá sálarlækna/sálarfrøðingi eftir heimkou til Føroya, um ein hevur verið fyri omanfyri nevndu hendingum við í mesat lagi kr. 2.500,- |